# Flogskipari fekk nokk av flogtúri

**30 skelkað ferðafólk sótu seinnapartin í gjár á flogvøllinum við Egilsstaðir eftir eina sera buldrasliga roynd at lenda í Vágum, har tað í hvirlunum var upp í 49 metrar um sekundið. Innflúgvingin í Íslandi var næstan líka ógvuslig**

ILLVEÐUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*So nógvur vindur var á flogvøllinum fyrrapartin í gjár, at eitt flogfar, sum stóð á vøllinum, lætti aðra síðuna, men fekk tó ongan skaða*

*Savsmynd*



*Nýútnevndi landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Høgni Hoydal, var eitt av ferðafólkunum á buldrasliga flogtúrinum fyrrapartin í gjár. Myndin er tikin í terminalinum á Egilstøðum í gjár*

Tvær ferðir kendu ferðafólkini seg sum í einari turkitrumlu, tá nógvi vindurin spældi bæði flogskipara og ferðafólkum eitt puss. Hetta greiðir eitt av ferðafólkunum frá, sum var í ein flogfari hjá Atlantsflog í gjár, ið royndi at lenda í Vágum, men orsakað av nógva vindinum mátti droppa at lenda og sett kós móti Egilstøðum í Íslandi, har tað var næstan líka nógvur vindur.

»Nú havi eg fingið nokk fyri eina løtu«.

Soleiðis segði flogskiparin hjá Atlantsflogi, tá hann stutt eftir middag hevði sett flogfar sítt á vøllin við Egilstaðir.

Í kabinuni sótu umleið 30 ferðafólk, og meginparturin mundu vera rættiliga skelkað av sera baldruta túrinum, greiðir ferðafólkið frá. Í øllum førum stóð nógv á fleiri, tá tey fyrst gjørdu eina roynd at lenda í nógvum vindi í Vágum og síðani gjørdu eina líknandi roynd á Egilsstøðum. Seinna royndin eydnaðist.

Í Vágum varð flogið inn yvir Miðvág og Leitisvatn, men har var vónleyst at seta flogfarið. Upplagda orsøkin var tann nógvi vindurin.

Merkiliga róliga røddin á flogskiparanum segði, at nú flúgva vit til Egilsstaðir eftir meira brennievni. Flúgvandi inn móti vøllinum møtti sami vindur flogfarinum, og enn eina ferð kendu fólk seg sum í einari ovurstórari turkitrumlu. Róp og skríggj. Men so endiliga bar til at fáa fast undir føturnar.

Seinnapartin sótu líkbleiku ferðafólkini og bíðaðu eftir floglíkindum í Vágum, hóast fleiri teirra svóru, at nú høvdu tey fingið nokk fyri fleiri ár.

Millum tey ferðandi var eisini Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum. Hann tóktist taka støðuna púra róliga. »Her gerst ikki annað enn at taka tað róliga", segði hann.

»Kemur tú at vitja meg í Íslandi?«, spurdi ein kona ein man, sum ikki rættiliga skilti spurningin.

»Eg havi jú búsett meg her, tí at flúga heim aftur – ja, tað geri eg ikki«, segði hon skemtandi.

Undir skemtinum búði ræðslan fyri at royna kreftir við føroyska vetrarveðrið – og ein nýggjan túr í turkitrumluni.

## Øgiligur vindur

Orsøkin til øgiliga royndina at lenda í Vágum, er helst rættiliga natúrlig, tí í hvirlinum í gjár var heilt upp í 49 metrar um sekundið, har skaði stóðst á flogvøllinum og eitt av tveimum flogførum, sum stóðu á vøllinum, lætti aðra síðuna, men fekk tó ongan skaða.

Í tíðindaskrivi, sum leiðslan fyri flogvøllin hevur lagt á heimasíðuna, verður sagt, at harðasta hvirlan kom klokkan 9.50, og at hendan gjørdi nakað av skaða.

Fólk vórðu tikin av fótum, og ein arbeiðsbilur, sum stóð inni á sjálvum flogvøllinum, varð tikin av vndinum. Eisini fóru onkur vindeygu, eins og portrini til bilhúsini vórðu trýst inn. Hesi eru annars gjørd til at tola 60 m/s.

Sum áður nevnt stóðu tvey flogfør á vøllinum, og hóast nógv stóð á, kláraðu tey vindin.

Eina løtu umhugsaðu flogleiðarar at sleppa sær burtur úr torninum, tí teir óttaðust trygdina.




**Eygleiðing av børnum og skrivlig frásøgn**

**Tað gerst alt meiri vanligt...**
...at skula veita skrivliga frásøgn, í sambandi við arbeiði. Og tá er tað umráðandi, at tú dugur at orða teg soleiðis, at øll skilja boðskapin rætt.

**Hevur tú ofta, ella av og á, tørv á** at orða eitt skriv til umsitingina og/ella foreldrini, um tey børn, tú arbeiðir við? Um tær eygleiðingar, tú hevur gjørt í sambandi við barnið? Føler tú, at tað hevur stóran týdning, at tú fært boðskapin fram á besta hátt, soleiðis at hann verður móttikin og skiltur rætt? Eisini uttan at hetta skal taka óneyðuga langa tíð og orku hjá tær?

**Tá vit skulu gera skrivliga frásøgn,** kann tað vera torført at avmarka, systematisera og bera boðskapin fram á ein slíkan hátt, at bæði umsiting og foreldur móttaka og skilja boðskapin í skrivinum, júst soleiðis, sum tú hevur ætlað.

**Á skeiðnum verður hugt at viðurskiftum,** sum kunnu hava avgerandi týdning, tá vit skulu skilja atburðin hjá børnum, hvussu tey knýta seg og hvussu tey reagera, tá tey eru undir trýsti.

Eisini verður hugt at fysisku, kognitivu, málsligu, kensluligu og sosialu menningarøkjunum hjá børnum, umframt familjuviðurskiftum og viðurskiftum við skúlan/stovnin hjá barninum.

**Skeiðið vendir sær til fólk...**
...sum arbeiða við børnum. Starvsfólk á dagstovnum, skúlum og frítíðarskúlum, dagrøktarar, sálarfrøðingar, barnaverndarlimir og onnur.

**Tilmeldingarfreist:** So leingi pláss eru eftir.

**Les meira og tekna teg** á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464).

Synergi

Synergi - Tvørgøta 13 - 100 Tórshavn
Tel. 22RING (227464) - Fax. 32BELL (322355)
www.synergi.fo - synergi@synergi.fo - skype: synergi-asa